# Ferðavinnan gevur pengar

*Ferðafólk brúka góðar tveyhundrað milliónir krónur árliga í samband við ferðing í Føroyum, sigur Bornholms Forskningscenter í kanning, sum varð almannakunngjørd mikudagin*



*Heri Niclasen, í miðjuni, er stjóri á Ferðaráði Føroya, sum hevur latið kanningina gera*

EDVARD JOENSEN

Ferðafólk, sum koma til Føroya, leggja væl av peningi eftir seg. Bæði við beinleiðis nýtslu í landinum, í samband við flutning og við arbeiði, tey skapa til aðrar veitarar, sum ferðavinnan brúkar. Nakað oman fyri 200 milliónir, verður mett í kanningini, sum var almannakunngjørd mikudagin.

Bornholms Forskningscenter hevur gjørt kanningina fyri Ferðaráð Føroya. Úrslitið er frágreiðing í trimum bindum, sum varð framløgd á tíðindafundi mikudagin.

Sum slíkum kanningum líkt, eru nógv tøl og nógvar talvur at lesa í frágreiðingini. Hóast sagt varð, at hendan frágreiðingin ikki bygdi á nágreiniliga tøl, men í ávísan part framrokningar av spurnarbløðum, eru tó rættiliga áhugaverdir upplýsingar hjá ferðavinnuni at arbeiða víðari við.

Ikki tí. Ivaleyst hevur vinnan framman undan ein rímiliga góðan varhuga av tí, sum frágreiðingin staðfestir.

Hvat tað er fyri fólkaslag, sum kemur hendanveg, hvussu leingi tey eru her, hvar og hvussu tey búgva og so framvegis.

Tað er kanska eitt serligt fólkaslag, sum vitjar Føroyar. Sambært kanningini er meðalaldurin á treimum, sum vitja okkum 47,2 ár. 45% av teimum vitjandi eru millum 45 og 65 ára gomul. Men tað eru fólk, sum vita, hvat tey vilja, letur til. Tí ikki færri enn tveir triðingar av teimum vitjandi hava eina hægri útbúgving.

Hinvegin siga tey, sambært kanningini, at hóast tey eru væl nøgd við tað, tey hava upplivað og fingið í Føroyum, ætla slakir tveir triðingar ikki at koma aftur.

Ymiskt var, sum hetta varð skilt av fólki frá ferðavinnuni. Onkur helt tað vera løgið, meðan onkur helt tað vera óheppið. Borið varð saman við Bornholm, har tað vísir seg, at tað eru somu ferðafólkini, sum ganga aftur.

Kanningin vísir kortini, at tað eru hóast alt nøkur ferðandi, sum ætla sær at koma aftur. 37% av teimum spurdu søgdu, at tað ætlaðu tey.

Men víst varð eisini á, at tað er kanska ikki bara ringt, at fólk velja nýggj ferðamál. Tey, sum hava verið, og siga seg vera væl nøgd, kunnu virka sum góð reklama fyri onnur, sum so møguliga velja at koma hendanveg. Og sum Charlotte Rassing frá Bornholms Forskningscenter segði, skulu føroyingar ikki verða so harmir um, at somu fókini ikki ganga aftur. Ti tey doyggja einaferð, og tá er hóast alt gott, at onkur annar kemur at vitja.

Tað vísir seg, at tað eru fólk, sum koma til eitt nú ráðstevnur, sum leggja flestar pengar eftir seg í Føroyum. Hetta verður hildið at koma av, at tey vanliga ikki gjalda ferð og uppihald sjálv. Tað ger ofta arbeiðsplássið ella tann, sum sendir tey á ráðstevnu, meðan vanligi ferðamaðurin, sum fyrst hevur brúkt pening til ferðina, seinni ansar eit sindur eftir, hvat brúkt verður.

Nógv tann størsti parturin av ferðafólkinum, sum kemur hendanveg, kemur úr Danmark. Heili 68% eru danir. 17% eru úr hinum Norðurlondunum, meðan bara 5% eru týskarar, hóast tað fyri mong kann tykjast, sum teir eru nógvir her. 8% koma aðrastani úr Europa, meðan restin er bólkað undir einum.

Tveir triðingar av ferðafólkunum, sum koma til Føroya, eru fólk, sum eru fyrstu ferð, meðan hin seinasti triðingurin hevur verið her fyrr, vísir kanningin.

# Havnarútbygging á Skála

*Skála Kommuna víðkar havnarlagið niðan fyri byggihøllina hjá Skipasmiðjuni. Eisini verða nýggj vatnreinsiverk gjørd á Skála og í Skálafirði*



*Atløgumøguleikarnir verða nógv betri framman fyri byggihøllini á Skála, tá havnarútbyggingin verður liðug*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Skála:** Skipasmiðjan á Skála fær betri umstøður at arbeiða upp á størri skip, nú havnarlagið verður víðkað niðan fyri byggihøllina.

Tað er eftir ynski frá Skipasmiðjuni á Skála, at Skála Kommuna er farin undir at gera størri bryggjupláss framman fyri byggihøllini, sigur Símun Pauli Berg, bygdarráðsformaður á Skála.

Tað er soleiðis, sigur hann, at Skipasmiðjan gjørdi vart við, at tað var eitt sindur óarbeiðsligt hjá teimum, tá stóru trolararnir lógu við bryggju, og bæði fólk og útgerð skuldu flytast upp fyri skipssíðurnar, sum eru rímiliga høgar á hesum skipunum.

Tað er nógv lættari og arbeiðsligari at leggja eina brúgv upp gjøgnum trolsliskuna á reyvini og so ganga tann vegin. Men hesin møguleikin var ikki á Skála, tí eingin krókur var at leggja skipini í, soleiðis at til bar at leggja hesa brúnna upp eftir hekkuni á skipunum.

Nú er Skála Kommuna so í gongd við eina útbygging, sum fer at gera hetta møguligt, sigur Símun Pauli Berg.

Framman fyri byggihøllini verða gjørdir 40 metrar av atløgubryggju innan fyri mittastu bryggjuna. Arbeiðið verður gjørt í tveimum stigum, og fyrra byggistig er komið nakað áleiðis. hetta fyrra byggistigið fer at umfata helvtina ella 20 metrar av bryggjukanti. Kanturin verður stoyptur inn eftir úr verandi pieri, og so verður fylt út innanfyri. Tá annað byggistig verður liðugt, røkkur nýggja bryggjan inn móti bedingini. Við nýggju bryggjuni verður rokkið út á seks metra dýpi. Neyðugt verður ikki at leingja pierin út eftir, sigur bygdarráðsformaðurin. Pierurin er nóg langur til, at øll skip, sum vanliga koma á Skála, kunnu liggja við hann. Tað er byggifelagið J&K Petersen, sum ger arbeiðið. Kostnaðurin fer at liggja um 1,6 millión krónur, sigur bygdarráðsformaðurin.

Símun Pauli Berg, bygdarráðsformaður á Skála sigur, at tosað hevur verið um at dýpa turrdokkina hjá Skipasmiðjuni. Enn er einki ítøkiligt komið til Kommununa um tað, sigur hann. Men um so verður, verður eisini neyðugt at dýpa havnina uttanfyri. Tí tað ber ikki til at tey skip, sum skulu í dokk, ikki sleppa inn, tí ov grunt er uttanfyri. Men enn liggur tann ætlanin úti í framtíðini, sigur bygdarráðsformaðurin á Skála, hóast hann ikki metir, at hon er langt burtur.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá leiðsluni á Skipasmiðjuni á Skála, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Av øðrum virksemi hjá Skála Kommunu er vatnreinsiverk, sum skal gerast, sigur Símun Pauli Berg. Hann sigur, at reinsiverkið skal gerast liðugt í hesum árinum. Tað verða í grundini tvey verk, sigur hann. Eitt á Skála og eitt í Skálafirði, sum eisini hoyrir til Skála Kommunu.

Nomatek hevur fingið hetta arbeiðið at gera, og tað fer at kosta umleið eina millión krónur, sigur Símun Pauli Berg, bygdarráðsformaður á Skála.



# Fiskivinnuting í Norðurlandahúsinum

*Í dag skipar Føroya Ráfiskakeyparafelag fyri fiskivinnutingi í Norðurlandshúsinum. Evnið verður verður fiskaflutningur, sum nøkur halda kundi verið betri*



*Føroya Ráfiskakeyparafelag skipar fyri fiskivinnutingi í Norðurlandahúsinum í dag* *Mynd: Jens Kr. Vang*

STEFAN Í SKORINI

Evnið á ráðstevnuni verður flutningur sjóvegis og loftvegis, og spurningur verður settur, um vit kunnu fáa meira burturúr við at menna flutningskervið.

Føroya Ráfiskakeyparafelag sigur, at „røddir hava verið frammi um, at flutningurin úr Føroyum, sum hesin er skipaður í løtuni, avmarkar víðari menning av vinnuni. Tí hevur Føroya Ráfiskakeyparafelag tikið stig til fiskivinnutingið, sum er ætlað at verða íblástur hjá teimum, sum fáast við flutning í Føroyum í dag“.

Tingið er fyrst og fremst ætlað fiski- og alivinnuni. Umboð fyri veiðuliðið, framleiðarar og útflytarar eru við á tinginum, og sjálvandi eru flutningsfeløgini eisini við á tinginum. Almenna umsitingin, sum í hesum føri er Vinnumálastýrið og Fiskimálastýrið, verður umboðað á ráðstevnuni. Skúlaflokkar hava víst tiltakinum áhuga, og næmingar og lærarar frá Fiskivinnuskúlanum og Handilsskúlanum verða millum luttakararnar.


